## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og regn eitt skifti. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot til andøvsgul av norði, sunnudagin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

# Hanus aftur í Klaksvík

**Klaksvíkingurin Hanus G. Johansen fer fyri fyrstu ferð í langa tíð at spæla aftur í Klaksvík. Tað fer hann at gera á tónleikafestivalinum, sum verður hildin miðskeiðis í august mánaði**

Hanus G. Johansen er helst fremsti føroyski vísusangarin, og hann hevur síðani hann var unglingi spælt og sungið fyri fólki.

Fyrstu árini var tað meira á gøtunum í Klaksvík at hann spældi, og har mátti hann við hvørt taka gittaran á nakkan og flýggja undan løgregluni, sum helt, at hann órógvaði friðin, men seinnu árini hevur hann bæði spælt til fínastu mentanartiltøk, til størri og smærri konsertir og festivalar.

Hanus G. Johansen dugir at fáa eina og hvørja áhoyrarafjøld at lurta eftir sær. Hann kann taka eina ørgrynnu av ymiskum sangum, og hann finnur altíð fram til kjarnina í einum tiltaki, so hann kann leggja nakað afturat tí – undirhalda og bergtaka.

### Meistaraligur tulkari

Hanus G. Johansen er kanska best kendur sum ein framúr tulkari av yrkingunum hjá Poul F. Joensen, og eftir at plátan »Gaman og álvara« kom út í 1988, gjørdist Hanus av álvara fólkaogn hjá føroyingum.

Plátan er næstan ikki til at fáa hendur á longur, tí øll vildu eiga sangirnar hjá Hanus og Pól F, og hesir sangir verða nógv sungir til veitslur og onnur tiltøk.

Men einki er, sum tá ið Hanus sjálvur syngur hesar sangir, og hann hugtekur bæði ung sum gomul, tá ið hann syngur sínar kendu sangir.

Hanus hevur langt frá bara sungið Poul F. Hann hevur eisini tulkað aðrar føroyskar yrkjarar, og hann hevur eisini sungið sangir hjá útlendskum skaldum og tónasmiðjum. Hetta hevur hann gjørt til alskyns tiltøk, og á stórum popp- og rocktiltøkum sum Ólavsøkukonsertini, G! festivalinum og aðrastaðni hevur hann verið stórliga fagnaður.

Eingin tekur Hanus á einum palli, og tað verður prógvað ferð eftir ferð.

### Eina og í bólki

Hanus Gærdum Johansen vaks upp í Klaksvík, og hann var virkin í tónleikalívinum í Klaksvík í nógv ár. Hann spældi við í onkrum tónleikabólkum, og hann sang og spældi eisini sjálvur.

Tá ið Frændur fyrstu ferð fóru í studio í 1984 var Hanus Johansen við í bólkinum. Tað kom væl við hjá hinum sangarunum og tónleikarunum í bólkinum, at Hanus var við, tí hann hevði royndt studio áður, og einki kundi taka hann av fótum.

Hanus var við til at seta dám av fyrstu og aðru útgávuna hjá Frændum, og hann er millum annað at hoyra á sangum sum Hundurin Brúni og Friðarsangur. Hanus hevur seinni árini eisini spælt nógv við einum øðrum bólki, og tað hevur verið eitt heilt annað slag av tónleiki. Hanus og Aldubáran góvu eina fløgu út, og samstarvið hevur eisini rokkið inn í Norðurlandahúsið og á aðrar føroyskar pallar.

Hanus er eitt av okkara størstu tónleikabegávilsum, og hann hevur verið framúr sum tulkari og tónasmiður. Men tá ið alt kemur til alt, so er Hanus helst allarbest sum Hanus – við einum gittara um hálsin á einum palli.



*Hanus G. Johansen fer í august mánaði at spæla við, tá ið ein nýggjur tónleikafestivalur verður hildin í Klaksvík*

Og tað verður hann aftur í Klaksvík leygarkvøldið 14. august.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 25 |
| London | 26 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 30 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 19 |
| New York | 24 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1011 hPa. yvir Atlantshavinum á 53N-36V fer móti Skotlandi og dýpist. nakað. Eitt hátrýst, 1034 hPa. í útsynning úr Írlandi viknar.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í landsynning eystan og brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum sunnan fyri Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/06 kl. 06[00]– 15/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 14/06 kl. 06[00]–15/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 62,5 mm







Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juni: Seinna kvarter
17. juni: Tendring/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. juni | 06.24 | 18.49 | 05.24 | 17.49 | 05.39 | 18.04 | 08.24 | 20.49 | 09.24 | 21.49 | 04.39 | 17.04 | 03.39 | 16.04 | 06.39 | 19.04 | 07.39 | 20.04 | 06.09 | 18.34 | 07.24 | 19.49 |
| 17. juni | 07.10 | 19.35 | 06.10 | 18.35 | 06.25 | 18.50 | 09.10 | 21.35 | 10.10 | 22.35 | 05.25 | 17.50 | 04.25 | 16.50 | 07.25 | 19.50 | 08.25 | 20.50 | 06.55 | 19.20 | 08.10 | 20.35 |
| 18. juni | 07.51 | 20.21 | 06.51 | 19.21 | 07.06 | 19.36 | 09.51 | 22.21 | 10.51 | 23.21 | 06.06 | 18.36 | 05.06 | 17.36 | 08.06 | 20.36 | 09.06 | 21.36 | 07.36 | 20.06 | 08.51 | 21.21 |
| 19. juni | 08.42 | 21.07 | 07.42 | 20.07 | 07.57 | 20.22 | 10.42 | 23.07 | 11.42 | — | 06.57 | 19.22 | 05.57 | 18.22 | 08.57 | 21.22 | 09.57 | 22.22 | 08.27 | 20.52 | 09.42 | 22.07 |

5 707265 100036 >